## Frá Blomsturlág:

## Fyribils eru vit flutt í Bøgøtu 14 har Blomsturbrá var áður



BLOMSTURLÁG

Tel. 311914 • Fax 321914



## Starv sum góðskuleiðari

Fyri framhaldandi at vera við í menningini av okkara framleiðslu og brynja okkum til stóru avbjóðingarnar, sum eru fyri framman, verður søkt eftir einum góðskuleiðara.

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi og áhugavert starv sum góðskuleiðari fyri Havsbrún. Eitt starv við nógvum avbjóðingum í vinnugreinum, sum eru í støðugum vøkstri og broytingum. Eitt gott arbeiðsumhvørvi, har tú kemur at taka lut í og leggja tilrættis góðskustýringina og dokumentatiónina av framleiðsluni frá rávørum til lidnar vørur.

**Tað er ein fyritreyt, at tú:**
- Hevur góð samstarvsevni.
- Kanst arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.
- Ert tolin, men samstundis ágrýtin.
- Hevur ein ávísan teldukunnleika, dugir væl at samskifta, bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Útbúgving:**
Vit kundu hugsa okkum, at tú hevur eina holla útbúgving, sum gevur tær kunnleika til framleiðslu, kemi, biologi og mikrobiologi.

**Byrjunartíð**
1. september, men vit kunnu bíða nakað eftir rætta fólkinum.

**Løn:**
Sambært avtalu.

**Eitt sindur um Havsbrún:**
Havsbrún er eitt av størstu virkjunum í Føroyum og hevur 35 ár á baki. Á Havsbrún eru tríggjar deildir: Mjøldeildin framleiðir mjøl og lýsi burturúr fóðurfiski og slógvi. Fóðurdeildin framleiðir fiskafóður. Pelagos heilfrystir pelagiskan fisk. Havsbrún hevur ein umsetning uppá uml. 300 mill. kr, harav helvtin er útflutningur. Umleid 100 ársverk eru á virkinum.

Hevur tú hug, áræði, og sært teg føran fyri at røkja hetta starv, ert tú vælkomin at søkja.
Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og skulu vera Havsbrún í hendi í seinasta lagi 24. juli.

Nærri upplysningar um starvið kunnu fáast við at ringja til Havsbrún, og spyrja eftir Jústines ella Pól.

HAVSBRÚN

pf Havsbrún
Box 81
FO-530 Fuglafjørdur
Tlf.: 44 41 60
Fax 44 44 00
Email:bep@havsbrun.fo

Sosialurin - 311820



## DAGLIGUR LEIÐARI

Søkt verður eftir dagligum leiðara
til telduhandilin 3-aran Electronic

Uppgávurnar hjá dagliga leiðaranum verða í høvuðsheitum fylgjandi:

- **Dagligur rakstur av handlinum**
- **Innkeyp av vøru**
- **Umsiting av handlinum**
- **Marknaðarføring**

*Vit vænta av tær, at tú:*
- Hevur holla vitan innan KT og handilsrøkt.
- Dugir væl at arbeiða saman við øðrum, men samstundis dugir at arbeiða sjálvstøðugt.
- Kann vera virkin í einum leiðarabólki.
- Kann fyriskipa arbeiði hjá øðrum.
- Er ein fyrikomandi persónur.

*Vit kunnu bjóða tær:*
- Eitt sera spennandi arbeiðspláss, har tú er partur av einum dynamiskum starvsliðið.
- Møguleikan at royna teg innan øll økir í handlilsvinnuni.
- Møguleikan at standa á egnum beinum og vera við at byggja ein handil upp frá grundini.

Løn sambært avtalu.

Heldur tú at hetta er júst nakað fyri teg, og hevur tú hug at royna tínar veingir innan handilsvinnuna saman við okkum, send eina umsókn til :

3arin
ELECTRONIC

Postsmoga 1057-1058 · 110 Tórshavn · Att: Hans/Gissur
Tel 35 35 35



## Frá 1000 ára haldinum

1000 ára · haldið

www.tusund.fo

Í sambandi vi› Jóansøkuna ver›ur frams‡ningin hjá J. P. Gregoriussen, arkitekti, í skúlanum í Vági frá 23.–30. juni, um kirkjurnar í Føroyum.



RZ017



BILLUTIR

ÚTVEGAST
TIL FLEST
ALLAR BILAR

F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666



VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820




*Fróðskaparsetrið og oljufeløg avtalu:*

# Oljuútbúgving á Setrinum

*Oljufeløgini Statoil, Phillips, Enterprise og Veba hava latið Fróðskaparsetrinum 600.000 kr. til at fara undir nýggja kolvetnisútbúgving*



*Útlensk oljufeløg vísa Fróðskaparsetrinum og her ikki minst Náttúruvísindadeildini støðugt størri áhuga. Fv. Annika Joensen, fyrisitingarleiðari, Malan Marnersdóttir, rektari og Hans Pauli Joensen, leiðari á Náttúruvísindadeildini. Aftan fv. Jacob Rugland, umboðsmaður hjá Phillips, Nicholas Wright, stjóri hjá Phillips og John Inderhaug, leitingarstjóri hjá Statoil*

JAN MÜLLER

Gongst sum ætlað kunnu teir fyrstu føroysku næmingarnir á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum fáa eina BS-útbúgving í kolvetnisverkfrøði um hálvtannað ár. Hetta er vorðið greitt, eftir at umboð fyri Fróðskaparsetrið og Statoil-oljusamtakið skrivaðu undir avtalu hósdagin.

Tað eru tey fýra oljufeløgini, Statoil, Phillips, Enterprise og Veba, sum hava játtað Fróðskaparsetrinum 600.000 kr. Peningurin skal brúkast til at byggja upp eina nýggja útbúgving á Náttúruvísindadeildini innan oljutøkni. Hetta verður gjørt við tí endamáli at útbúgva føroyskar kolvetnisverkfrøðingar til at kunna vera við í menningini av eini føroyskari oljuvinnu. Peningurin fer til undirvísing og til at seta skjøtil á eina rannsóknarstovu fyri borievju.

Tað eru teir næmingarnir, sum hava gingið á Støðisútbúgvingini nú í tvey ár, sum fáa henda nýggja møguleikan. Av teimum 10 næmingunum, sum verða lidnir við Støðislesnaðin í ár, fara 5 víðari til BS framhaldsútbúgvingina í kolvetnisverkfrøði. Teir verða so lidnir um jóltíðir ár 2001.

Eftir lokna útbúgving hava tey møguleika at fáa arbeiði í oljuvinnuni, men kunnu eisini lesa víðari til masterstig á lærdum háskúlum í útlandinum. Tá hava tey eisini møguleika at gera høvuðsuppgávur í Føroyum, t.d. projektuppgávur, sum næmingar avtala við eitt nú oljuídnaðin. Tað er sera vanligt í øðrum londum, at vinnan og útbúgvingarstovnar samstarva fyri at samfelagið kann fáa sum mest burtur úr.

Hans Pauli Joensen, leiðari á Náttúruvísindadeildini er fegin um nýggjastu avtaluna við oljufeløgini. Hann heldur stuðulspening til slíkar nýggjar útbúgvingar verða kærkomnan, tí hann er við til at leggja lunnar undir nakað, sum vit sjálvi seinni verða før fyri at fíggja og menna.

Tað hevur eydnast teimum at fáa føroyskar lærarar til nærum allar lærugreinarnar á nýggju BS-útbúgvingini. Hetta heldur Hans Pauli Joensen vera sera positivt. Tað hevur týdning at vit hava fakfólk í Føroyum, sum kunnu undirvísa á teimum nýggju útbúgvinginum innan oljutøkni men eisini á eitt nú KT-økinum. Fleiri av undirvísarunum koma frá Jarðfrøðissavninum og Oljumálastýrinum, sum eisini arbeiðir við at leggja til rættis føroyskt tilfar at brúka í undirvísingini.

Malan Marnerdóttir, rektari á Fróðskaparsetrinum er fegin um nýggju útbúgvingina. Hon heldur tað vera rætt at kunna bjóða føroyingum útbúgving innan kolvetni, nú ein slík vinna tykist gerast veruleiki í Føroyum. Hon heldur eins og Hans Pauli Joensen tað ikki vera nakað skeivt í tí at taka ímóti peningi frá oljufeløgum. Tá talan er um væl-defineraðar og avmarkaðar verkætlanir, sokallað pilotprojekt, er einki óvanligt í tí, at vinnan stuðlar almennum lærustovnum.

Síðani samstarv tók seg upp við Høgskolan í Stavanger í 97 hevur samstarv tikið seg upp á útbúgvingarøkinum, ið fevnir um fleiri ymiskar skúlar. Eitt nú sjómansskúlar, tekniskar skúlar og Fróðskaparsetrið, tvs. at hetta fevnir um vanliga undirvísing og granskning. Samanlagt skal alt hetta kunna gera føroyska samfelagið betri ført fyri at taka ímóti tí nýggju avbjóðingini, sum ein oljuvinna er. Og arbeiðið hevur eisini longu borið ávøkstur. M.a. hava boriskeiðini verið so væleydnað, at fleiri føroyingar hava fingið størv í Noregi og eftirspurningur er eftir fleiri.

Tað verður annars høvuðsfyrisitingin á Fróðskaparsetrinum við Anniku Joensen sum leiðara, ið fer at taka sær av umsitingini av nýggjastu avtaluni millum Setrið og oljufeløgini.

### Vanligt at stuðla

John Inderhaug, leitistjóri hjá Statoil sigur, at tað er vanligt, at teir sum oljufelag stuðla eitt nú útbúgvingarstovnum. Teir hava longu stuðlað stovnum í Føroyum, og henda nýggja avtalan er so bert enn eitt stig víðari. Teir eru hugaðir at halda fram við at stuðla føroyskum útbúgvingum og granskning, sum hava við eina komandi oljuvinnu at gera. Hetta gera teir sjálvandi eisini fyri sína egnu skuld. Fyri oljufeløg hevur tað týdning, at føroyska samfelagið útbúgvir síni egnu fólk til nýggju vinnuna, soleiðis at hetta kann gagna bæði Føroyum og teimum oljufeløgum, sum vilja arbeiða her.

John Inderhaug sigur seg annars vera væl nøgdan við støðið á føroyskum útbúgvingarstovnum og heldur, at grundútbúgvingarnar liggja á einum hægri støði enn í Noregi.

Eisini onnur oljufeløg vísa virkseminum á Fróðskaparsetrinu ans. Herfyri lat oljufelagið Texaco Náttúruvísindadeildini fleiri stórar arbeiðsteldur. Nú um dagarnar høvdu umboð fyri BP fund við leiðsluna á Setrinum.



*Hans Pauli Joensen, leiðari á Náttúruvísindadeildini og Nicholas Wright , stjóri í Phillips skriva undir avtaluna.*


LIFTON Products

**Vit umboða LIFTON í Føroyum og vilja vísa á 6 góðar grundir til at brúka hydraulik sum drívmegi**

- Lættari amboð
- Minni slit
- Minni viðlíkahald
- Meiri flutningsvinarlig
- Minni olju/bensin nýtsla
- Kunnu brúkast, har illa er atkomandi



Drívstatión LP8 P 9 HK Honda bensin motor. Klárar allar vanligar uppgávur. Ein maður kann bera hana lættliga.



Tekur so lítið pláss, at hon kann flytast við persónbili.
Drívstatiónir fáast við bensin motori frá 9-18 HK.
Drívstatiónir fáast við diesel motori frá 7-9 HK.



Hydraulik hamari LH 25 S. Klárar sjálvt tær stóru uppgávurnar.

Eisini fáast borimaskinur. Betong/asfalt sagir, vatnpumpur o.m.a.

Ring og fá eitt maskinprát
tlf. 422394 - 284792 - fax 422395

O. K. HEILSØLA & MASKINUR
430 Hvalvík - Tlf. 422394

Sosialurin - 311820